

FALLIN Í FÁTT

# Hann mátti tvingast norður aftur

*Nú hevur Páll Vang verið í tvingaðari útlegd úr heimbýnum í meiri enn 10 ár og honum leingist ómetaliga illa heimaftur. Men tá ið hann frætti um spariætlanirnar á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi, fall hann í fátt. Kona hansara heldur, at nú átti hann at havt eitt sjálvsagt krav upp á at sloppið heimaftur*

uppskriftin uppá at menna seinheilaskadd andliga. Og tann andliga menningin er fortreytin fyri allari aðrari menning.

– Hendan fyritreytin hevur fylgt starvsólkunum á sambýlinum í Niðaragøtu alla tíðina og sostatt hava bæði Páll Vang og nógv onnur við honum, fingið stóra hjálp haðani til at mennast og koma víðari í lívinum.

### Tað besta

Og hesi árini á sambýlinum í Niðarugøtu, hevur Páll Vang eisini ment seg ómetaliga nógv, tí venjingin, hann fær, er fantastiska góð, bæði pedagogiskt, psykologiskt og ikki minst menniskjasliga.

Andliga er hann sostatt komin rættiliga væl fyri seg aftur.

Men kropsliga er hann hinvegin bundin at hjálparfólki alt samdøgurið og tí hevði eitt búpláss á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi akkurát verið tað rætta staðið fyri hann.

Tað er eisini kona hansara, Elin, púra sannførd um.

Hon sigur, at andliga er hann mentur so mikið væl, so nú er hann búgvin til at flyta suður, har tann kropsliga venjingin kann halda fram.

Og júst til fysioterapi eru umstøðurnar á Suðuroyar Sjúkrahúsi so góðar sum nakrastaðni, so hevði hann sloppið suður, hevði tað verið tað besta, sum kundi hent fyri hann.

– Hann tosar ikki um annað og hugsar ikki um annað, leggur hon afturat.

Tá ið Páll Vang hevur eitt so brennandi ynski um at sleppa suður á ellis- og røktarheimið at vera, er tað ikki tikið úr leysari luft.

Hann hevur nevniliga verið til umlætting á Suðuroyar Ellis og Røktarheimi.

Fyrstu ferð, hann var tað, var á jólum í fjør.

– Tað var sum at vakna til enn eitt nýtt lív, sigur hann.

Hann sigur, at av tí, at hann hevur verið sjúkur so leingi, vóru tey flestu av búfólkunum, suðuroyingar, hann kendi frá tíðini, hann var sjálvur í vælmaktini á Tvøroyri.

Tað gjørdi, at hann rættiliga føldi seg heima, og hann mátti bókstaviliga tvingast norður aftur.

Sjálv heldur hon, at nú hevur Páll Vang verið í tvingaðari útlegd úr heimbýnum í meiri enn 10 ár fyri at menna seg aftur, so nú átti hann at havt eitt sjálvsagt krav upp á at sleppa heimaftur.

## Bláa bókin hjá Páll Vang

Føddur: 8. august í 1949.
Foreldur: Jóhanna, fødd Andreasen, úr Fámjin og Pauli Vang úr Froðba.
Hjúnafelagi: Elin, fødd Jacobsen, úr Norðragøtu og tey giftust í 1971.
Børn: fýra døtur, sum eita Barbara, fødd í 1972, Hanna, fødd í 1975, Rakul, fødd í 1979 og Elisa, fødd í 1986.
Barbara er løgfrøðingur í Eik og er gift við Dánjali Samuelsen úr Havn, tey búgva í Havn og eiga tvey børn, Heðin, sum er sjey ár og Pál, sum er trý ár.
Hanna er magistari í føroyskum og fronskum og er gift við Georg Kjærbo úr Sumba, tey búgva á Tvøroyri og eiga tvey børn, Páll, sum er 12 ár og Rúna er sjey ár.
Rakul er sjúkrasystir í heimarøktini, hon býr í Havn saman við Signar Joensen úr Sørvági og tey eiga tvey børn, Elin, sum er tvey ár og Hjørdis, sum er tríggjar mánaðir.
Elisa lesur »almenna umsiting« í Danmark, hon býr saman við Høgna Joensen úr Hvalvík og tey eina ein son, Elias, sum er tvey ár.
Sostatt eru abbabørnini sjey í tali.
Í 1973 tók Páll læraraprógv á Holbæk Seminarium og hevur verið lærari á Venjingarskúlanum í Havn, á Tvøroyri og Trongisvági.
Í 1981-85 var hann landsstýrismaður fyri Fólkaflokkin, har hann umsat landbúnaðarmál, heilsumál, samferðslumál og løgmál.
1986 til 1993 hevði hann meklaravirki á Tvøroyri.
Í 1985-2000 var hann býráðslimur á Tvøroyri, og tey síðstu sjey árini, frá 1993, var hann borgarstjóri, men við árslok 1999 fór hann frá fyri sjúku.
Harumframt hevur hann havt onnur álitisstørv. Hann var nevndarlimur í Brunatryggingini og limur í stýrinum fyri Suðuroyar Sjúkrahús.
Frá 1993 til 1999 var hann eisini formaður í Býarfelagnum, sum var eitt samstarv ímillum seks tær størstu kommunurnar í landinum og sum seinni varð til Kommunusamskipan Føroya.
Páll Vang var eisini fleiri ferðir valevni til løgtingsval fyri Fólkaflokkin í Suðuroy.